# Á ein hátt skilji eg væl Finn Helmsdal

**-Tað er ikki stór sparing í at avtaka stuðulin til uppihaldspening, men tað er eitt eymt mál, sigur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*



*Tað er ikki bara Finnur Helmsdal, sum hevur brotið avtalur í samgonguni, sigur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi*

Eg má siga, at á ein hátt skilji eg Finn Helmsdal.

Heini O. Heinesen er formaður tjóðveldisfloksins á tingi. Og hann vil sum so ikki leggja seg út í stríðið ímillum Finn Helmsdal, sum hevur sitið eina tíð á tingi, og Páll á Reynatúgvu, landsstýrismann.

Ósemjan kom rættiliga fram í ljósið, fríggjadagin, tá ið Finnur Helmsdal ikki vildi atkvøða fyri at avtaka stuðulin til uppihaldspening.

Endin var, at Páll á Reynatúgvu mátti taka uppskotið aftur.

*Men var tað ikki ein avtala í samgonguni?*

– Tað er møguligt, at tað er ein avtala. Men tað er ein spurningur, hvør varð eftirspurdur, tá ið avtalan varð gjørd.

Heini O. Heinesen sigur, at hetta er ein partur av eini semju, sum landsstýrið gjørdi á Viðareiði, tá ið fíggjarlógin skuldi gerast.

– Og eg havi í hvussu so er ikki verið við til at gera nakra avtalu um at avtaka stuðulin til uppihaldspening og ongin hevur spurt meg um mína meining í hesum.

## Ivast

Heini O. Heinesen sigur, at hann ivast eisini í, hvussu klókt tað er at leggja eitt uppskot fram um at avtaka stuðulin til uppihaldspening.

– Eg veit ikki, hvussu stór sparing er í tí. Upprunaliga fingu vit at vita, at tað gav 12 milliónir. Men nú hava vit fingið upplýst, at talan er um væl minni enn fimm milliónir, tá ið avtornar.

– Men vit vita eisini, at hetta er eitt ógvuliga umstrítt mál, tí har tað rakar, rakar tað hart. Og tá ið tað gevur so lítið, sum tað í veruleikanum ger, er tað ein spurningur um, hvussu rætt tað er at leggja tað fram.

– Hetta er tað sama hjá samgonguni sum at biðja um trupulleikar og tað er tað ongin orsøk til, serliga tá ið tað hevur so lítið upp á seg sum tað hevur í hesum føri.

– Tí havi eg ein ávísan samhuga við teirri støðu, sum Finnur Helmsdal tók.

Hann heldur ikki, at fólkaflokkurin hevur nakra sum helst orsøk til at leika í um júst hetta málið.

Hann sigur, at málið um uppihaldspening er ikki einasta avtalubrot í samgonguni seinastu dagarnar, so tað er ongin orsøki til at gera hetta til nakað serstakt.

Hann vísir á, at samgongan hevur eisini beint nú samtykt gera umstøðurnar hjá útróðrarflotanum verri.

Fyri at kunna selja ella lata síni fiskirættindi í fremmandum sjógvi okkurt ár, hevur tað verið ein treyt, at bátur hevur fiskað 60% av kvotuni árið frammanundan.

Nú skeyt landsstýrið upp at avtaka regluna.

Men Løgtingið, við hjálp frá samgonguni, gjørdi tað beistagerð, at samtykkja, at bara rækjuflotin og uppisjóvarflotin, skuldi sleppa undan 60% markinum, men at útróðrarflotin, sum hevur kvotu undir íslandi, framvegis skal vera bundin at 60% regluni.

Sostatt noyðast útróðrarbátar undir Ísland, hóast tað ikki loysir seg, ella mugu teir heilt selja íslandskvotuna.

Heini O. Heinesen sigur, at hetta er líka grovt avtalubrot, sum okkurt annað, tí landsstýrið hevði skotið upp at útróðrarflotin skuldi vera javntsettur við rækjuskipini og uppisjóvarskipini.

Hann vísir eisini á, at Finnur Helmsdal hevði boðað frá, at hann tók ikki undir við uppskotinum.

Annars Heldur Heini O. Heinesen, at tingmanningin hjá tjóðveldisflokkinum virkar rættiliga væl, og at hann hevur eina góða tingmanning. Eisini tá ið Finnur Helmsdal hevur sitið á tingið, tí hann hevði nógv skilagott at føra fram.

Annars vil hann ikki sum so leggja seg út í málið, tí hetta er eitt mál ímillum ein tingmann og landsstýrið og ikki eitt mál sum er innanhýsis í tingmanningini. Og harafturat er Finnur Helmsdal ikki longri ein partur av tingmanningini, tí hann var varamaður fyri Annitu á Fríðriksmørk, sum hevur verið í barnsburðarfarloyvi.

# Høgni Hoydal: Heilt ótrúligt

**– Eg kann greitt og staðiliga avsanna, at tað verður arbeitt við at flyta almanna- og heilsuskúlan á Tvøroyri suður til Vágs, sigur Høgni Hoydal**

SKÚLAVIÐURSKIFTI
*Áki Bertholdsen*



*Tað eru ongar ætlanir um at flyta almanna- og heilsuskúlan á Tvøroyri til Vágs. Tvørturímóti verður arbeitt við at finna betri høli á Tvøroyri, sigur Høgni Hoydal, landsstýrismaður í mentamálum*

**Suðuroy:** Hetta vísir bara, hvussu ótruligar leysasøgur kunnu vera.

Høgni Hoydal, landsstýrismaður í mentamálum afturvísir heilt avgjørt, at ætlanir eru um at flyta almanna- og heilsuskúlan á Tvøroyri suður til Vágs.

Annars hevur tað gingið sum rótasúpan seinastu tíðina, at loyniligar politiskar ætlanir verða bryggjaðar saman í hesum døgum um at flyta almanna- og heilsuskúlan á Tvøroyri suður til Vágs. Tað er ikki sørt, at hetta hevur loypt órógv á Suðuroynna og hevur sett kílar í viðurskiftini ímillum norðaru- og syðru helvt í oynni.

Tað var Heðin Mortensen, løgtingsmaður, sum bar hetta fram á fyrsta sinni á løgtingsins røðarapalli, tá ið málið um nýggjan miðnámsskúla í Suðuroy var til viðgerðar.

Síðani hava lesarabrøv í bløðunum róð uppundir tað saman, eins og prátið manna millum vita at siga, at so er.

– Hetta er eitt dømi um, at roynt verður at grugga eitt mál til fyri at venda eygunum frá teimum politisku framstigunum, sum verða gjørd.

Høgni Hoydal afturvísir staðiliga og púra avgjørdur, at nakrar sum helst ætlanir eru um at flyta skúlan.

– Tvørturímóti arbeiða vit við at finna honum onnur og betri høli á Tvøroyri, sigur hann.

– Tá ið málið um miðnámsskúlan í Vági var til viðgerðar í tinginum, tvíhelt Heðin Mortensen um, at eg skuldi havt sagt í mentanarnevndini, at ætlanin var a flyta skúlan.

Høgni Hoydal sigur, at tað var júst tað øvugta, hann segði við mentanarnevndina.

– Tað eg legði dent á í mentanarnevndini var, at Almanna- og heilsuskúlin skal verða verandi á Tvøroyri. Eg segði eisini, at eg helt, at tá ið Hovstunnilin er skotin ígjøgnum, verður ongin trupulleiki hjá báðum skúlunum at samstarva, tí tá verður Suðuroyggin so tætt samanbundin, at tað verður skjótt og lætt at ferðast ímillum.

Hann sigur, at tvørturímóti at flyta skúlan, hevur mentamálaráðið samskifti við Tvøroyrar býráð um at loysa stóra hølistrupulleikan hjá skúlanum.

– Vit hava eitt gott samskiftið við býráðið á Tvøroyri og eg vit hava havt fund um málið og tað haldi eg var ein góður fundur.

Og Høgni Hoydal sigur, at onkur høli á Tvøroyri eru í kikaranum, sum skúlin kanska kann leiga, men enn er onki avgjørt.

– Trupulleikin er, at skúlin fara undir tað fullu útbúgvingina, krevur tað onnur høli.

Og Høgni Hoydal sigur, at tað verður arbeitt hart fyri at útvega skúlanum onnur høli.

Hinvegin liggur tað longri frammi í tíðini, at talan verður um at byggja nýggjan skúla og tí verður í løtuni arbeitt vit at útvega skúlanum høli, uttan at byggja.



# Eitt verkfall rakar meint

**Ruskið hópast upp. Barnaansingin steðgar. Mjólkin gongur undan. Fiskavirkingin steðgar. Alivinnan kann fáa trupulleikar at fóðra. Eitt verkfall kann fáa ógvusligar avleiðingar hesaferð og merkist hjá øllum kring alt landið**

SAMRÁÐINGAR
*Ingi Rasmussen*



*Samráðingarnar á Hotel Føroyum gingu trekar millum arbeiðsgevararnar og arbeiðarafeløgini við Ingeborg Vinther á odda. Tað kundi endað við verkfalli*
*Mynd: Jens K. Vang*

Meðan eygnalokini hingu meira og meira á Hotel Føroyum, har sáttmálasamráðingarnar leikaðu í, líktist alt meira einum verkfalli.

Eitt verkfall, sum hesaferð rakar allar Føroyar. Áður hevur Føroya Arbeiðarafelag staðið einsamalt, og tí er Havnin sloppin mest sum snikkaleys. Nú standa øll arbeiðarafeløgini saman: Føroya Arbeiðarafelag, Klaksvíkar arbeiðsmannafelag, Klaksvíkar arbeiðskvinnufelag, Havnar arbeiðsmannafelag og Havnar arbeiðskvinnufelag.

Tað merkir, at tey kunnu leggja alt landið mest sum lamið. Avleiðingarnar røkka út í hvønn krók í samfelagnum.

## Rusk hópast upp

Ein trupulleiki, sum fólk beinanvegin merkja á egnum kroppi, er ruskinnsavningin og -brenningin. Bæði Kommunala brennistøðin í Havn og IRF lata aftur í somu løtu, sum verkfall er.

– Vit hava fyrireikað okkum soleiðis, at vit eru ajour. Men alt steðgar í somu løtu verkfall er. Ruskið verður ikki savnað ella brent. Hesaferð rakar verkfallið hart, og vit kunnu rokna við, at tað tekur dupulta tíð at koma uppundan aftur. Verður verkfall í eina viku, tekur tað fjúrtan dagar hjá okkum at brenna. Samstundis krevjast eyka fólk at savna húsarhaldsruskið inn, sigur Jógvan Júst Justinussen, stjóri fyri IRF.

## Ansing steðgar

Barnafamiljurnar merkja eisini skjótt, at verkfall er, og tað krevst vælvild frá arbeiðsplássum ella góðar ommur, um tað skal hanga saman.

Á øllum ansingarstovnum kring landið eru tað limir í arbeiðarafeløgunum, sum vaska, og tað verður hildið at vera óforsvarligt, at hava opið, tá vaskingin steðgar.

– Eftir trimum døgum steingir barnagarðurin, og eftir fýra døgum steingir vøggustovan. Foreldrini taka tað tungt. Tey eru ikki óð við okkum, men tey eru í dýrastu neyð, tí tey ikki fáa børnini ansað. Vit noyðast til arbeiðis kortini, og vit fáa avgreitt ymiskt, sum vanliga ikki er tíð til, sigur Fríðgerð Sundskarð, leiðari á Lítlaskógi í Havn.

## Væntaðu verkfall

Framleiðsluvinnan verður rakt alt fyri eitt. Fiskavirkini í øllum landinum steðga maskinunum og snara lykilin í somu løtu, verkfallið verður lýst. Fiskavirkini eru givin at keypa fisk, tí tey roknaðu við verkfalli.

Tað hevur eisini víst seg, at alivinnan verður hart rakt, tá tey tímaløntu fara heim, tí tað gongur út yvir fóðringina. Hana hava stjórar tikið sær av í neyðstøðu, men trupulleikin er eisini, at fóðrið ikki verður koyrt fram. Hinvegin ljóðar, at alivirki hava lagt fóður inn undir seg og klára seg eina tíð.

## Kanska vørutrot

Alt eftir, hvussu langt eitt møguligt verkfall verður, so kann hugsast, at gerandisvørur fara at ganga undan.

Ein trupulleiki, sum plagar at raka barnafamiljurnar, er mjólkin. Útkoyringin av mjólk heldur uppat, og goymslurnar hjá handlunum eru skjótt tómar, tí mjólkin spillist.

Koyring av vøru frá heilsølum stegðar eisini, og tí hava handlar longu lagt inn undir seg.

Áðrenn blaðið fór til prentingar var kortini óvist, um nakað verkfall fór at vera. Partarnir vóru framvegis saman á Hotel Føroyum, og so leingi semingsmaðurin enn helt lív í samráðingunum, var vón.

# Fólk fylla sær tangarnar

**Fólk væntaðu sær verkfall. Tað vísti bensinsølan kring landið. Men ongin panikkur var í kortini. Fólk tóktust bíða eftir tíðindunum, áðrenn tey fóru at hamstra**

SAMRÁÐINGAR
*Ingi Rasmussen*

Bilurin og føroyingur eru eitt. Og eitt gott barometur fyri, um fólk vænta sær verkfall, er sølan av bensini. Eftir køunum við bensinstøðirnar at døma, so roknaðu føroyingar við verkfalli.

– Øll vilja koyra, og út frá bilrøðunum, sum vit hava havt, vænta fólk verkfall. Í gjár vóru væl fleiri enn vanligt, og serliga í morgun (hósmorgunin, blðm.) hava nógv keypt bensin frá okkum. Fleiri hava eisini keypt upp í dunkar. Nógv bíða eisini og vita,um partarnir fara hvør til sítt. Verður verkfall rokna vit við uppaftur fleiri bilum, sigur Hanna Thomsen av Statoilstøðini við Streymin.

Tey hava fylt sær tangarnar, so tey hava okkurt at standa ímóti við. 7.000 litrar av blýfríum og 4.000 av diesel var fylt á mikudagin, og tað skuldi rokkið til nakrar dagar, heldur Hanna.

## Meira á Frælsinum

Shell-støðin á Frælsinum í Havn hevur eisini selt meira bensin enn vanligt.

– Hetta er ikki av tí ringasta, men í gjár (mikudagin, blðm.) seldu vit kortini nógv meira enn vanligt. Kanska eru tað serliga tey, sum koyra nógv, byggifeløg og onnur, ið leggja inn undir seg. Vanlig fólk taka tað meira róligt og bíða eftir tíðindum um verkfall, sigur Poul Hans Jacobsen av Shell-støðini á Frælsinum.

Shell við Frælsið hevur fylt sær tangarnar. 25.000 litrar av hvørjum slagi var í hvørjum tanga og fyllast skuldi aftur á tremur, um og áðrenn verkfall kom. Men tað røkkur ikki til meira enn ein dag, sigur Poul Hans Jacobsen. Hinvegin klárar Shell-støðin við Ringvegin tað dupulta, men tað er so bara til tveir dagar.

## Rólig í Klaksvík

Klaksvíkingar tykjast róligari enn fólk við Streymin og í Havn.

– Kanska vit hava selt eitt sindur meira av bensini og diesel enn vanligt, men tað er ongin panikkur í. Fólk taka tað róligt, sigur Jákup Heinesen, leiðari á Statoilstøðini í Klaksvík.

Hann hevur sína góðu forkláring uppá, hví fólk ikki vænta tað stóra.

– Verður tað verkfall, so verður tað ikki langt. Hesaferð verður Havnin eisini rakt, og so gongur tað skjótari at fáa hetta avgreitt, sigur Jákup Heinesen.

